Væleydna› fimleikaframs‡ning

Leygarkvøldi› 8. apríl hev›i fimleikafelagi› Ljósi› eina væleydna›a frams‡ning í høllini á Hálsi

Heini í Skorini

Leygarkvøldi› 8. apríl hev›i fimleikafelagi› Ljósi› frams‡ning í høllini á Hálsi, og sum sagt var hetta eitt væleydna› tiltak. Sera nógv fólk var og hugdi at frams‡ningini, og ta› vænta›i líti› á, at fyriskiparmir komu í ney› av væntandi sitiplássum.

Frá 450 til 500 fimleikarar sluppu at royna seg á gólvinum, og er ta› sera nógv til eina fimleikaframs‡ning. Ta› var› byrja› eitt sindur ø›rvísi hesafer› enn undanfarin ár, tí tá fimleikararnir komu inn á gólvi›, komu teir úr øllum ættum, og tónleikurin var eisini ø›rvísi enn hann plagar at vera, tá fimleikararnir ganga inn.

Poula Michelsen, forma›ur í Ljósinum sigur, at tey vóru sera gla› og nøgd vi› frams‡ningina leygarkvøldi›.

-Ta› vóru 23 li› sum vóru fleiri fer›ir inni á gólvinum, og fimleikaframs‡ningin vardi í tveir tímar, sum eisini var ætlanin á›renn hon byrja›i. Vit hava lagt sera nógv orku í hesa frams‡ning, vit hava vant og arbeitt vi› hesum í allan vetur, og vit eru eisini sera gla› fyri frams‡ningina leygarkvøldi›. Poula Mikkelsen leggur afturat, at trupulleikin hjá Ljósinum í løtuni er, at ta› eru uml. 550 limir í felagnum, og felagi› hevur einki fast sta› at venja og at savnast í. Í løtuni brúkar felagi› fimm høllir at venja í kring Havnina, og tá tey savnast til fundir og anna›, er ta› runt í heimum hjá ymiskum venjarum og fyriskiparum.

Ta›, at tey eru noydd at flyta frá høll til høll allatí›ina, ger ta› verri at arbei›a, sigur Poula Mikkelsen.

Ein fimleikaframs‡ning er ikki ein kapping, har tú vinnur ella tapir, men ta› er sum teimum flestu kunnugt ein frams‡ning. Hóast hetta, hevur veri› arbeitt og vant til hesa frams‡ning líka frá september mána›i, so ikki kann sigast anna›, enn at nógv orka hevur veri› løgd í hesa frams‡ning, og ta› sást eisini aftur í leygarkvøldi›, tá fimleikararnir framførdu.

Eitt stórt framstig í fimleikafelagnum Ljósinum er, at fyrr hava bara gentur veri› vi›, men nú eru dreingir eisini komnir uppí felagi›, og ta› var ein frøi fyri øll fimleikaáhuga›i at síggja. Dreingirnir sum framførdu leygarkvøldi› eru uml. 10 ára gamlir, onkur eldri onkur yngri, og ta› kom greitt til sjóndar, at teir hava tiki› seg sera nógv fram, og hava havt stór framstig, frá tí teir byrja›u.

Fleiri fimleikaframs‡ningar hava veri› seinastu tí›ina, og ta› hevur sæst t‡›iliga, at stø›i í føroyskum fimleiki hækkar.

-Stø›i í føroyskum fimleiki hækkar sera nógv í løtuni, ta› sóu vit m.a. á oyggjaleikunum í rei›skapi. Í 1998 komu vit jú eisini á eitt tri›ja pláss í Danmark í rytmiskum fimleiki, so stø›i hækkar heilt víst í løtuni, endar Poula vi› at siga.

DAGFØR
TEG
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.